
Hevur tú ein spurning ella onkran trupulleika, sum tú kundi ynskt tær at fingið viðgjordan í hesum teiginum,

Spyr Sosialin

Skriva til: Sosialurin, postsmoga 76, 3800 Argir. Merk brævbjálvan »Spyr Sosialin«.



Eyðun Joensen, sálarfrøðingur



Marjun Sigurdsdóttir, sosialráðgevi



Marner Simonsen, lækni



Friða Patursson, logfrøðingur

Hægsta ynski — at fáa barn

Læknin:

Vit eru barnleys hjún, sum hava verið gift í 15 ár, og ~~sum~~ heithugaði ynskja at fáa børn. Tey fyrstu 5 árini í hjúnalag nýttu vit fyribyrgjandi evni (gummi), tað var meðani vit bygdu hús og bæði noyddust at hava fullan arbeiðsdag. Nú sita vit væl í ti, góð hús við øllum nútíðar hentleikum og góðari inntøku. Men tá vit høvdu roynt í 5 ár uttan úrslit at fáa okkum børn, varð konan kannað. Tó dugdi læknin einki óregluligt at finna. Hon varð so kannað aftur, einar tvær ferðir við sama úrsliti.

Vónandi skylja tygum, at vit nú halda tíðina vera komna at troyta allar møguleikar at røkka at hjúnabandsins málsetningi. Vit eru ikki samd við lækna okkara í svari hansara, og eru spurningar okkara til lækna tíðindablaðsins teir somu sum vit settu lækna okkara:

Hvør er orsøkin til, at sáðkyknurnar aftaná sáðlát ikki renna upp í livmóðirina, men harafturímóti tann øvugta vegin út aftur? Hvat kann gerast fyri at beina hesí forðan av vegnum? Um skurðtiltak má fremjast, hvussu verður tað gjørt, hvussu long er sjúkralegan? Um tiltøk mugu fremjast av serlækna, er tá møguleiki fyri styttari bíðing eftir at koma á tal við hann? Og til seinast: Eru onnur tiltøk, vit kunnu seta í verk fyri at betra »gróðrarvánirnar«?

Sum sagt vilja vit fyrst royna allar møguleikar fyri at fáa eitt barn sjálvi, áðrenn vit fara at søkja um adoptión.

Tøkk fyri vónandi nøktandi svar.

2 íð ikki hava slept vónini enn

Fyrsti spurningur tit seta er, hví sáðið ikki fer upp í livmóðrina. Tí spyrji eg: hvar vita tit hetta frá, og er tað kannað?

Tað er ein ávís orsøk til at sáðkyknurnar ikki sleppa ígjognum livmóðurhálsin niðan í livmóðrina. Tað er ikki tí tey renna út aftur, men har afturímóti ti tað er eitt serligt evni í livmóðurháls sliminum, sum er orsøk til hetta. Tað er nakað torført at kanna og prógva.

Tit nevna einki um møguliga aðrar orsøkir til, at tit ikki fáa børn, so hetta er neyvan kannað rættuliga.

Tíverri nevna tit einki um aldur tykkara, men tá tit hava verið gift í 15 ár, so mugu tit vera uppi í 30-unum. So hevur tað skund at fáa hetta kannað nágreiniliga.

Fyrst vil eg ráða tykkum til at fara til lækna, ella til sjálvi at uppsøkja serkøna hjálp.

Rætta mannagongdin í slíkum fori er, at maðurin fyrst verður kannaður. Er tað í lagi, verður konan síðan kannað.

MS



Hví blíva konufólk ómøgulig tá tær fáa mánasjúku

Eg havi eina fitta konu, sum er farin um tey tríati árini.

Trupulleikin er hjá okkum, at hon ikki er til at hava við at gera, nakrar dagar áðrenn mánasjúkan kemur.

Hon hevur átt barn, men tá gekst væl. Hon var í góðum lag alla tíðina.

Nú kann kona mín ikki ganga við børnum alla sína livitíð.

Hvat kunnu vit gera, so hon ikki fær hesi herðindi...

maður

Tað kann kvinnan einki gera við sjálv. Hetta er ein ávirkan í heilanum í samband við tíðina stutt eftir eggloysing.

Sama sinnalag sæst eisini hjá barnakonum fyrstu mánaðarnar í barnsferðini.

Tað finst ein rættiliga góð viðgerð fyri hesum — nevniliga p-pillara viðgerð, sum steðgar eggloysingini, og harvið ger, at tíðin við tí broytta sinnalagnum ikki kemur.

MS

Hetta er normalt fyribrigdi hjá eini normalari kvinnu.

Flest allar kvinnur hava slíkt tíðarbil áðrenn mánasjúku.

Á fremmandum máli nevnist tað LABIL PSYKA, og merkir, broyting í sinnalagnum. Hetta er ein sinnisligur veikleiki, sum óvanliga lætt kann broyta og sum ávirkar familju og umhvørvið sum heild.

Ringir tú til Sosialin, spyr vinarliga eftir Dagny, sum tekur sær av spurningum undir hesum teiginum

Galla konsert

Fjølbroyttar tónlistaframførslur verða at hoyra, — frá kórsangi um kamartónleik til jazz, í Norðurlandahúsinum leygardagin

Leygardagin skipar Konsertfelagið fyri stórfingnum tiltaki innan tónleikaheimin.

Ikki minni enn 175 tónleikarar og sangarar savnast saman í Norðurlandahúsinum. Har verður fjølbroyttur tónleikur at hoyra, frá kamar- og horntónleiki, kór- og solosangi, til jazztónleik.

Luttakarnir koma ymsa staðni frá í landinum: Kristiliga Sangkórið við instrumentalum fylgispæli, sum Kári Bæk leiðir. Fuglafjarðar Gentukór við Fritz Johannesen og Jákup á Lækjuni, sum leiðarar.

Við klaverið situr Heðin Kambsdal. Havnarkórið við Ólavi Hátún, rytmiskt kór og orkestur frá Studentaskúlanum, har leiðarin er Zacharis Sørensen og gentukór úr Eysturskúlanum, við rytmiskum bólki og sekstett, sum Pauli í Sandagerði stjórnar. GHM luttekur eisini við Jørgen William Hansen, og ein blásikvintett úr Klaksvíkar Hornorkestur verður eisini at hoyra, umframt kamarkvartett, kamartrioir, kamarduoir, solosangur, klaversolo og jazzkvartett við Brandi Øssursson.

Atgongumerki fáast við dyrnar ein tíma áðrenn konsertin byrjar.

Kostnaður: 20 krónur fyri limir Konsertfelagsins og 40 krónur fyri ikkilimir.

— Í Norðurlandahúsinum leygardagin 26. november kl. 16.



Silvurbrúdleyp

Í morgin friggjadagin kunnu hjúnini Henny og Martin Juul Jarnskor í Norðragøtu halda silvurbrúdleyp.

Silvurbrúdleyp

22. nov. kunnu hjúnini Finngerð og Heini Johansen, Vestmanna, halda silvurbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

23. nov. kundu hjúnini Sylvia og Robert Magnussen, Vestmanna, halda silvurbrúdleyp.

Brúdleyp

19. nov. giftust í Fuglafirði Margreta Joensen, Hvalvík, og Suni Justinussen, Lorvík. Br. adr.: var Lorvík.

Rætting

Rætting til blaðið í dag, viðvíkjandi havnavígsluni í Vestmanna. Tað vóru Vestmanna Hornorkestur og Harmoniorkestrið G.H.M., ið spældu til hátíðarhaldið og ikki Havnar Hornorkestur sum skriva stóð.

Umberið okkum.

Martin Luther og bíblian

eitur almenni fyrilesturin, sum Petur Martin Rasmussen heldur á Fróðskaparsetrinum í kvøld kl. 20,00. í fyrilestrasalinum á Debesartrøð.

Hetta er hin seinni av tveimum fyrilestrum um Martin Luther í sambandi við 500-ára dag hansara — og seinasti almenni fyrilestur á skránni hesumegin nýggjár.